NÝTT BAÐIRÚM

damor



**Modena baðirúmsmøbil**
Trý undirskáp - tilsamans 120 cm. Við svartari granit vaskiborðplátu, spegli og handtøkum. Uttan háskáp, ljós, glashill og blandingsbattarí.

3.998,-

**Ignis halogensett**
Vi tveimum lampum og umformara. **498,-**

**Glashill**
10 x 120 cm. **378,-**



**President baðirúmsmøbil**
Skáp við tveimum hurðum. Við vaski og handtøkum. Uttan blandingsbattarí.
Vanligur prísur 1.498,-

NÚ 898,-



**Massagukabina**
- við ella uttan damp.
98 x 98 cm. Hædd 215 cm.
Ryggmassaga, radio, toppljós, bakljós, brúsusett og blandingsbattarí.
Avmarkað nøgd er á goymslu síðst í november.
Kann bíleggjast nú.

Massagukabina 9.998,-

Dampkabina 11.998,-



**M-2112 Gosbað**
135 x 135 x 62 cm. 6 jet dysur, ljós, nakkapútu og blandingsbattarí.
Avmarkað nøgd er á goymslu síðst í november.
Kann bíleggjast nú.

9.998,-

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor


# Gongugøtan verður umvæld



**Tórshavnar kommuna er farin í holt við at umvæla gongugøtuna í miðbýnum í Havn**

GONGUGØTAN
*tíðindaskriv*

Í fyrstu syftu verður bøtt um gøtuna, soleiðis at hon verður betur at ganga á fram til jóla. Tíðliga í komandi ári verður farið undir at steinseta gongugøtuna av nýggjum.

Nú eru nøkur ár liðin síðani gongugøtan varð steinsett. Gøtan hevur verið nógv brúkt. Undirlagið hevur givið seg í fleiri støðum, soleiðis at steinar eru vorðnir skeivir og leysir, og tað er sjónligt at gøtan trongir til ábøtur. Undan Ólavsøku varð bøtt nakað um gøtuna, og nú undan jólum verða steinar tiknir burtur, og asfalt verður koyrt í, so gøtan gerst javnari at ganga og koyra á.

Aftaná nýggjár verður farið í holt við eina meir umfatandi renovering av gøtuni. Allir steinarnir verða tá tiknir upp, og undirlagið verður umvælt. Nýggja gongugøtan verður steinsett við brúgvasteinum, eins og gjørt er á krossinum Sverrisgøta/Tórsgøta. Byrjað verður við strekkinum frá býráðssalinum til standmyndina við Glade Hjørn. Seinni verður restin av strekkinum niðan til breiða gonguteigin við Steinatún umvælt.

Meðan arbeiðið stendur uppá verður ferðslan tarnað, men gangandi verður sum vanligt.

*Undirlagið á Gongugøtuni hevur givið seg í fleiri støðum, soleiðis at steinar er vorðnir skeivir og leysir*

## Løgin list

Í Føroyum varð nógv kjakast um sømiliga list og ósømiliga list, tá Gríma framførdu Ginusøgur. Seinastu vikurnar hevur kjakið um samkynd verið merkt av hugburði, ið tykist heldur gamaldags. Í Íslandi er frísinnið eitt heilt annað. Unga íslendska listakvinnan Hallgerður Hallgrímsdóttir er lesandi við listaskúla Íslands, og arbeiðir við eini verkætlan um seks við álvum.

Á heimasíðuni "Sex with humans is boring" á http://elftruths.blogspot.com, roynir unga listakvinnan at savna søgur frá fólki, ið hava havt kynsligt samband við álvum. Verkætlanin verður til eina bók um evnið. Men umfatar eisini eina marknaðarføringsherferð við klistrimerkjum og plakatum, ið skulu reka fólk inn á heimasíðuna. Bókin kemur út í Íslandi í desember, hetta er í tøkum tíma til jólasøluna.

**nud**

## Slepp tínum innara sangara leysum

Fríggjakvøldið fáa tey, sum halda Singstar til Playstation 2 vera heimsins besta telduspæl, og tey sum altíð enda á Sams Bar, tá tey eru í Keypmannahavn, møguleika at útliva sínar villastu karaoke fantasiir saman við Showmonnum.

REX hevur fyrr roynt hetta tiltak og tað hevur verið væleydnað, Showmenn spæla undir fyri teimum, ið hava hug at koma á pallin at royna seg. Hetta er ein møguleiki at sleppa á pallin við nøkrum av Føroya bestu tónleikarum. MEGA karaoke náttin við Showmonnum er leygarnáttina millum eitt og hálvgum trý. Aldursmarkið hetta kvøldið er 20 ár.

Leygarkvøldið er 25 ára aldurmark og tá spæla sjálvandi eisini Showmenn

**nud**

## Ein annarleiðis Troubadurur í Café Natúr

Avstralski trubadururin Rob Luca spælur á Café Natúr frá hóskvøldinum til sunnukvøldið. Vanliga verður hugsað um ein mann og ein gittar, tá trubadurar vitja Café Natúr, men so er ikki á hesum sinni. Rob Luca spælir ljómborð og hevur rútmuboks.

Hetta kundi boða frá einum longum og festligum vikuskifti í Café Natúr. Mikukvøldið verður triðja umfar av pub quizini í Café Natúr, hvørt mikukvøld verður kappast um heiður og øl, umframt møguleikan fyri at kappast um ein VIP túr í býin.

## Føroyskt jólabryggj á toppinum



Tað er næstan vorðið ein vani, men stoltleikin í Klaksvík man kortini vera hin sami hvørjaferð.

Tá áhugafelagið, Vestjysk Ølkultur, fyri stuttum hevði sína árligu blindsmakking av jólabryggi, var Føroya Bjór millum luttakandi sløgini. Og aftur í ár var tað ølið úr Klaksvík, sum fekk besta skoðsmálið.

Av teimum átta merkjunum í floki 1 og 2 fekk jólabryggið hjá Føroya Bjór flestu atkvøðurnar, og einki er at ivast í, at limirnir í ølklubbanum av álvara hava tikið føroyska ølið til sín. Á heimasíðu teirra renna vitjandi seg soleiðis beint í eina lýsing, har felagið bjóðar seg til at bíleggja føroyskt øl til teirra, sum vilja royna hetta. Og hóast prísirnir eru nakað hægri enn tað, sum danir eru vanir við, so man tað ganga so hampuliga væl við søluni kortini.

Heimasíðan hjá felagnum er annars www.vko.dk, á henni ber til at síggja úrslitið av seinastu royndarsmakkingini, eins og øl-tíðindi av ymsum slag eru at lesa.

**-mørk**

## Dansur hvørt hóskvøld í Glitni

Í Glitni hava tey seinastu mánaðarnar havt unplugged tónleik nærum hvørt hóskvøld, men frá í morgin verðu konseptið broytt. Glitnir bjóðar nú ókeypis almennan dans hvørt hóskvøld frá kl. 21.00

Hetta verður nú roynt fram til jóla, og verður tikið væl undir við tiltakinum er lítið at ivast í at hildið verður fram.

Tað verður húsaorkestrið sum fer á pallin. Húsaorkestrið er manna við Georg Eystan Á og Sólvu Ford. Tey eru kend kring alt landið fyri sín lætta dansitónleiki.

**-nud**